

www.oljan.fo

**Jan Müller** 17 - 07 - 2012

# ASCO keypir útgerðarhavn í Norðurskotlandi

Føroyar fara at fáa harða kapping frá útgerðarhavnini í Scrabster í Norðurskotlandi, nú stórar útbyggingar fara fram við markið - um so er at føroysk vinna ætlar sær at vera við til at veita vørur og tænastur til hetta virksemið. Í hvussu er fylgir tænastuvinnan í Skotlandi væl við oljumenningini á øllum Atlantsmótinum komandi árini. Og fyri at styrkja um sín leiklut í hesi rættiliga nýggju oljuprovinsini hevur risastóra oljuútgerðarfyritøkan ASCO gjørt av at keypa útgerðarhavnina í Scrabster, ið skal vera staðið, sum í framtíðini fer at lofta tí nógva útgerðarvirkseminum, ið bara fer at vaksa á Atlantsmótinum. Eftirspurningur fer at vaksa Nýggjar útbyggingar av oljuleiðunum á Atlantsmótinum millum Føroyar og Hetland fyri hundraðtals milliardir krónur komandi árini, fara at skapa nógv nýggj arbeiðspláss innan tænastuvinnuna. Og hetta ætla skotar at gera sær dælt av. Ein av heimsins størstu útgerðarfyritøkum, ASCO, sum eigur og rekur oljuhavnir nógva staðni í heiminum, hevur nú av álvara sett kós móti Atlantsmótinum fyri at fáa ein part av køkuni, nú virksemið her fer at vaksa nógv komandi árini. Fyritøkan, sum eitt nú stendur fyri nógva virkseminun í Aberdeen, hevur júst keypt Scrabster Port Services, sum í dag veitir tænastur til oljuvinnuna. ASCO keypti 50% av havnini í 2009 og hevur nú keypt hina helvtina eisini. Andrew Macdonald, stjóri fyri europeiska virkseminum hjá ASCO sigur, at Scrabster fer at gerast miðdepilin fyri logistikkinum, útgerðarstreymsamskipanini, í sambandi við stóru oljuútbyggingarnar vestan fyri Hetlandi komandi árini. Góðu bryggjuviðurskiftini og beinleiðis samband til meginlandið gera Scrabster vælgnað til komandi avbjóðingarnar. Alstóran týdning William Calder, stjóri í Scrabster Harbour Trust fegnast um tíðindini og heldur fyri, at avgerðin hjá ASCO at gera hesa íløguna, undirstrikar týdningin Scrabster fer at fáa sum veitari til oljumenningina á Atlantsmótinum. Útgerðarhavnin í

Scrabster, SPS varð sett á stovn í 1997 við tí endamáli at veita tænastur til framleiðandi keldurnar vestan fyri Hetland og annars eisini økjunum kring Føroyar skriva bretskir miðlar, ið nærum allir hava ASCO íløguna í Scrabster á breddanum. Í løtuni verður djúphavnin í Scrabster útbygd fyri at nøkta vaksandi eftirspurningin komandi árini. ASCO hevur sum er nærum 1000 fólk til arbeiðis á teimum stóru oljuhavnunum í Aberdeen, Peterhead og Great Yarmouth. Nú gongur leiðin longur norður og vestureftir. Í Føroyum hava eisini verið royndir gjørdar at vera við til at veita tænastur til økta oljuvirksemið, serstakliga á markinum millum Føroyar og Hetland. Tað hevur so givið nakað av arbeiði til oljuhavnina í Runavík, til Tórshavnar Havn og til ymsar veitarar av vørum og tænastum so sum skipasmiðju, oljufeløg, heilsølur, gistingarhús og hýruvognsvinnuna. Í hvønn mun Føroyar og føroyskar fyritøkur fara at fyrireika og menna seg at fáa part av køkuni, tænastuveitingum til vaksandi oljuvirksemi millum Føroyar og Hetland kunnu vit bara gita um. ASCO er annars ikki ókent í føroyskum oljuvinnuhøpi. Tá føroyskar havnir kappaðust um at gerast oljútgerðarhavn hja teimum fyrstu boringunum um aldarskiftið, var samstarv millum vinnuílvsfólk Havn og ASCO. Hesi blivu kortini ov stutt, ti oljuhavnin endaði i Runavik. Keldur - BBC Skotland, ASCO Mynd - Havnin í Scrabster